

## John Rødgaard vann

Leygardagin skipaði Klaksvíkar Talvfelag fyri Grand Prix Kvik-kapping, sum var í Ósáskúlanum og er partur av Grand Prix-kappingini 2009/10. Enn eina ferð var tað John Rødgaard, ið vann kappingina, og hann var sera tryggur allan vegin ígjøgnum. Eftir tey sjey umførini, har eitt korter var til hvørt talvið, hevði John hálvtsjeynda stig av sjey møguligum og gjørdist vinnari. Finnbjørn Vang, sum hevði vunnið hálva stigið frá John, gjørdist nummar tvey, og á triðja plássi kom 17 ára gamli unglingatelvarin úr Havn, Hjalti Toftum Jógvansson, við fimm stigum. Tilsamans vóru 20 telvarar við í kappingini, har Helgi Joensen var stinnastur fyri telvararnar við 1900 styrkistigum ella minni, og Heðin Gregersen var bestur hjá telvarum við styrkitalinum 1400 ella lægri.

## Challenge Trophy-hópurin er tikin út

Fyrst í næsta mánaði skal A-landsliðið hjá kvinnum í hondbólti til Estlands at spæla við í Challenge Trophy-kappingini, sum hesa ferð er skipað í bólkum. Føroyar eru komnar í bólk saman við Finnlandi, Moldova og Estlandi, sum er vertur fyri hesum bólkinum.

Kvinnurnar leggja út við at spæla ímóti Estlandi fríggjadagin 2. apríl, síðani leygardagin 3. apríl ímóti Finnlandi og at enda sunnudagin 4. apríl ímóti Moldova. Ein hørð dystarskrá við trimum dystum í tríggjar dagar, men hinvegin er tað ikki annað, enn hondbóltskvinnurnar eru vanar við frá undanfarnu Challenge Trophy-kappingunum.

Nú fráferðin nærkast, hevur landsliðsvenjarin, Claus Rasmussen, tikið út 15 spælarar til kappingina. Tó hevur hann ein sekstanda spælara við í hópinum fyribils, tí ivamál er um ein spælara. Tað er málverjin, Erla Eliasen, sum møguliga ikki verður klár, og so skal Guðrun í Lágabø við í staðin.

hil

### Úttikni hópurin:

Durita Christoffersen, Stjørnan
Liljan Djurhuus, VÍF
Erla Eliasen, Aalborg
Judith Hansen, Stjørnan
Heidi Joensen, VÍF
Ninna Johansen, Virum
Unn Kragesteen, Neistin
Guðrun í Lágabø, Tjaldur
Durita Ljósstein, Stjørnan
Durita Mikkelsen, Stjørnan
Agnes Olsen, VÍF
Una Olsen, Stjørnan
Fríða Petersen, Neistin
Simona Petersen, Stjørnan
Súsanna Petersen, Kyndil
Vivian Petersen, VÍF

# Havnar Fimleikarfelag fór avstað við øllum



Havnar Fimleikafelag endaði sum samanlagdur steypavinnari í øllum bólkunum. Her ein mynd av kvinnunum, sum vunnu á Kambsdali og samanlagt
Mynd: Regin Egilsson Joensen

**Hóast Støkk og Ljósið vunnu hvør sína av seinnu steypakappingunum, forðaði tað ikki Havnar Fimleikafelag í at gera slætt borð og vinna allar fimm bólkarnar í steypakappingunum samanlagt**


einstistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Leygardagin og sunnudagin var seinna steypakappingin í estetiskum fimleiki í ítróttarhøllini á Kambsdali, har kappast var í fimm bólkum. Kvinnur, kvinnuunglingar og smágentur kappaðust leygardagin og gentur og pinkur sunnudagin.

Hetta var ein stór kapping, tí ikki færri enn 23 lið og 381 fimleikarar vóru við, og tilsamans 11 dómarar skuldu døma liðini út frá trimum ymsum førleikastigum, sum vóru teknikkur, listarligt avrik og framførsla.

Tá fyrra steypakappingin var í Runavík síðst í januar, vann Havnar Fimleikafelag í øllum fimm bólkunum, so tí aldusforsetin í føroyskum fimleiki eisini favorittur undan seinnu kappingini, hóast spenningurin var stórur, tí fleiri av liðunum hava flutt seg nógv.

Tað vísti seg eisini, at munurin á fleiri av liðunum var so lítil, at tað bara vóru smáu marginalarnir, ið avgjørdu. Eftir hesa seinnu steypakappingina skuldu úrslitini frá báðum kappingunum eisini teljast saman, so samlaðu steypavinnararnir skuldu finnast.

### Sera lítil munur

Hjá smágentunum varð tað Støkk, ið vann leygardagin, men kortini var tað ikki nóg mikið til at hótta Havnar Fimleikafelag a samanlagt, so tí gjørdist havnarfelagið steypavinnari. Men munurin var sera lítil, bara 0,30 stig!

Havnar Fimleikafelag var hinvegin ikki hótt í kappingunum hjá kvinnuunglingum og kvinnum, har tað bæði gjørdist til sigur leygardagin og samlaðan sigur, so Havnar Fimleikafelag her gjørdist steypavinnari tvær ferðir aftrat.

Sunnudagin vóru so pinkur og gentur á skránni. Hjá pinkunum vann Havnar Fimleikafelag a aftur, og gjørdist steypavinnari. Hjá gentunum eydnaðist Ljósinum at fara framum hesa ferð og vinna kappingina leygardagin, men tað var kortini ikki nóg mikið til samanlagt at fara fram um Havnar Fimleikafelag a, sum eisini gjørdist steypavinnari her.

Næsta stóra kappingin í estetiskum fimleiki verður føroyameistarakappingin.

## Steypakappingin 2010

| | Fyrra | Seinna | Samanlagt |
|---|---|---|---|
| **Kvinnur** | | | |
| Havnar Fimleikafelag | 14,50 | 13,08 | 27,58 |
| Støkk | 14,34 | 12,13 | 26,47 |
| Ljósið | 14,27 | 12,05 | 26,22 |
| **Unglingar** | | | |
| Havnar Fimleikafelag a | 14,16 | 12,77 | 26,93 |
| Støkk | 13,36 | 11,88 | 25,24 |
| Havnar Fimleikafelag b | 11,66 | 9,98 | 21,64 |
| Flog | 11,70 | 9,80 | 21,50 |
| **Smágentur** | | | |
| Havnar Fimleikafelag a | 14,93 | 13,05 | 27,98 |
| Støkk a | 14,53 | 13,15 | 27,68 |
| Ljósið | 12,13 | 11,03 | 23,16 |
| Havnar Fimleikafelag b | 12,23 | 10,17 | 22,40 |
| Støkk b | 11,27 | 9,37 | 20,64 |
| Flog | 10,03 | 9,12 | 19,15 |
| Klaksvíkar Fimleikafelag | - | 8,68 | 8,68 |
| **Gentur** | | | |
| Havnar Fimleikafelag a | 14,03 | 13,70 | 27,73 |
| Ljósið | 13,70 | 13,90 | 27,60 |
| Støkk | 13,40 | 12,82 | 26,22 |
| Havnar Fimleikafelag b | 10,93 | 10,77 | 21,70 |
| **Pinkur** | | | |
| Havnar Fimleikafelag a | 12,97 | 12,73 | 25,70 |
| Støkk a | 12,63 | 12,52 | 25,15 |
| Støkk b | 10,80 | 9,93 | 20,73 |
| Havnar Fimleikafelag b | 10,13 | 9,50 | 19,63 |
| Ljósið | | 9,88 | 9,88 |